# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Herðaklapp til Sunda kommunu

Fólkaskúlin hevur staðið fyri mongum skotum seinastu tíðina – ikki minst eftir vánaliga PISA-úrslitið, sum setti okkum í bás sum landið við heimsins vánaligasta fólkaskúla, tó at hetta helst skal takast við ávísum fyrivarni.

Um dagarnar frættist, at Sunda kommuna hevur gjørt av at keypa øllum lærarunum í kommunu hvør sína berbara teldu. Hetta eru fløvandi tíðindi til skúlafólk – ikki bara í Sunda kommunu, men um landið alt, tí hetta boðar kanska frá nýggjum vindum, hvat skúlapolitikki viðvíkur.

Tað var einaferð ein skúlastjóri á einum skúla í Svøríki, sum setti eitt stórt skelti upp á skúlan, har tað stóð: "Skúlin fyri læraran". Hetta var av mongum tikið illa upp, tí skúlin er sjálvandi fyri næmingarnar, meðan hann" bara er eitt arbeiðspláss hjá lærarunum".

Men skúlastjórin var tá skjótur at siga, at um skúlin ikki var fyri lærararnar fyrst og fremst, so var hann slett ikki fyri næmingarnar.

Og tað er júst hetta, sum okkara politiska skipan ikki skilir. Eitt eru lønarviðurskiftinini hjá lærarunum, sum ikki kunnu metast við tey á privata arbeiðsmarknaðinum. Men arbeiðsumstøðurnar annars hjá fólkaskúlalærarunum eru út av lagi vánaligar.

Við at kaga inn í ein av fólkaskúlunum, so síggja vit, at lærarar fyri so vítt ongar umstøður hava uttan fyri skúlastovuna. Sjálv undirvísingin er í tíð ikki meira enn helmingurin av arbeiðstíðini hjá læraranum. Teir hava einki skrivaraborð, ongan stól, onga teldu og onga telefon.

Tað hevði ikki gingið á nøkrum privatum arbeiðsplássi – og neyvan heldur í nøkrum av stovnunum, sum varða av skúlanum – ella fyri tað í Mentamálaráðnum.

Sunda kommuna eigur tí stórt herðaklapp fyri hetta herðaklappi, tey geva sínum lærarum: At geva teimum hvør sína berbara teldu. Hetta er eitt gott framstig – og bendir á, at tey í Sunda kommunu vilja virða skúlan!

**Sosialurin**

## Happing

**HERI MOHR**



Í hesum døgum hava fjølmiðlar, skúlar, foreldur, lærarar og onnur viðgjørt vandamálið happing av børnum (og tilkomnum). Hetta fyribrigdi, sum kann seta djúp spor í sálarlívið. Serliga um happingin fer fram í heimum og skúlum, kann hon ávirka tilveruna hja viðkomandi í ólukku máta. Eisini á arbeiðsplássum fer happing fram millum vaksin fólk. Hesin óndskapur kann súrga og dálka mangt lívið.

Nógv er skrivað og sagt um happing, hetta elligamla fyribrigdi. Vit kunnu hóskandi tríva eitt sindur í rúgvuna.

Í skaldsøguni ”Det forsømte forår” av Hans Scherfig hendir mangt og hvat á einum studentaskúla, og á hesum skúla telur karakterurin í fimleiki við, tá ið studentsprógvið verður givið.

Ein av næmingunum er ikki av teimum fimastu. Hann klárar t.d. ikki at leypa um hestin. Tá hann kom fram á hálvan hestin, sat hann fastur; sveittin fór at renna av honum, kanska eina mest takkað verið læraranum: ”*Hvad satan i helvede din drønnert,*” segði lærarin, meðan hinir næmingarnir flentu, ”*skal du voldtage dyret*? *Det er faneme en hanhest, dit svin*.” Og tað gekk heldur ikki væl, tá ið hesin neyðars drongur skuldi lesa seg upp eftir tognum. Lærarin fann sína fínu gullnál fram og rendi hana í endan á dronginum - ”*Kan du så komme op, dit fedesvin*.”

Og í latíntímanum rópti lektarin Blomme til ein næming: ”*O, du smækfede Crassius! Hvis du kan overvinde din medfødte dorskhed, så luk dit kæmpegab og begynd at oversætte lektien, du fedling*.”

Her eyknevna lærararnir næmingin óndsinnað!

Í skaldøguni verður Blomme myrdur av einum næmingi, sum hevði stungið gift í eitt av maltbommunum, sum lógu í einari eskju á pultinum, og sum Blomme vanliga tugdi, meðan hann hevði tíma.

Í sínum endurminningum skrivar Johannes Møllehave um ein lærara, sum hótti næmingarnar, tá ið teir ikki dugdu nóg væl::

”*Du kan jo blive grønthandler*! *Du kan blive en glimrende grønthandler! Så kan du komme hjem med friske tomater til din mor om lørdagen! Men her har du ikke noget at gøre!*”

Longri niður enn til grønmetiskeypmann kundi ongin søkka. – Og har sat sonur grønmetiskeypmannsins og gjørdist reyður sum ein tomat, tí pápi hansara var jú satt at siga ikki komin so langt.

Í tí gomlu Havnini, Verdens navle, hjá William Heinesen finna vit krøktar mannalagnur við eyknøvnum: *Tongla-Anna, Tand-Georg, Fredrik Smisk, Krumpe Kroghals* o.fl. Hetta at eyknevna fólk eyðkendi havnarfólk fyrr í tíðini, men í stóran mun var tað kanska ikki so óndsinnað.

Hann, ið hetta skrivar, hoyrdi mangan niðrandi - eisini í skúlanum: ”*Tú ert ikki annað enn ein mohrari*.” Kundi ofta yngst mær eitt annað eftirnavn.

Men happing kann, hóast píning og líðing, í undantaks føri menna og styrkja eitt menniskja sálarliga og mentunarliga so mikið, at sigurin á tí ónda kann gerast fullkomin. Feskasta dømi um eina slíka uppreisn úr myrkrinum og inn í tað syngjandi ljósið er bretin Paul Potts, sum við síni vøkru og málmríku tenorstemmu gjørdist heimskendur í somu løtu, hann trein alment inn á pall. Hansara lív hevði annars verið ein líðing, mest orsakað av happing. Spurdur um hann var skaðafróður mótvegis teimum, sum høvdu gjørt honum lívið tungt við happing, svaraði hann so beskeðin: *Nei, als ikki, og fyri alt tað so hevur happingin kanska gjørt sítt til, at eg áhaldandi bardist fyri tí, eg vildi verða, nevniliga ein stórur sangari*.

Gentlemansvøggan er framvegis í Onglandi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.